**VØGGUSTOVAN OG BARNAGARÐURIN Á KONMANSMÝRU**

# Pedagogar

Vøggustovan á Konmansmýru søkir eftir 2 pedagogum at starvast 30 tímar um vikuna. Størvini verða sett 01.03.2007 (ella eftir avtalu).

Lønin er sambart sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Vøggustovan er ein sjálvsognarstovnur við 35 børn í aldrinum 1 til 3 ár. Vit hava 3 stovur og 4 starvsfólk á hvørjari stovu.

**Krøvini til tín eru:**

- At tú ert fyrikomandi og erligur.
- At tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt og ábyrgdarfult í samráð við børn og starvsfelagar.
- At tú heldur at arbeiði í einari vøggustovu er spennandi og avbjóðandi.
- At tú dugir at síggja avbjóðingar fram um avmarkingar.
- At tú er nærverandi og dugir at lurta.
- At tú vil verða við til at menna stovnin og arbeiða við tí vit seta okkum fyri.

Vit bjóða eitt áhugavert starv, har tú sleppur at verða við til at mynda títt egna arbeiði og gerandisdagin hjá børnunum. Vit liggja í einum spennandi umhvørvi tætt við Hoyvíkstjørn og sniggøtunum á Konmansmýru.

Meira fæst at vita við at venda sær til leiðaran Katrin Bjarnadóttir ella álitisfólkinum Jóhannu Laksá á telefon 313131.

Skrivlig umsókn skal verða okkum í hendi seinast 01.02.2007.

**Vøggustovan á Konmansmýru**
Hoyvíksvegur 41 B
FO – 100 Tórshavn

---

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

# *Lærarar til tekniska skúlan*

### *Timburdeildin søkir eftir tveimum faklærarum !*

Av tí at virksemið á timburdeildini økist, sóknast vit eftir einum dugnaligum faklærara til **fast fulltíðarstarv** og einum dugnaligum faklærara til **tíðaravmarkað fulltíðarstarv í 2 ár** vegna farloyvi.

Vit vænta:
- at tú hevur sveinabræv sum húsasmiður.
- at tú hevur hollan og dagførdan kunnleika innan byggiøkið.
- at tú hevur viðkomandi starvsroyndir.
- at tú hevur eina framhaldandi útbúgving.
- at tú hevur teldukunnleika og dugir nakað av støddfrøði.
- at tú dugir væl at arbeiða við ungdómi.

Vit bjóða:
- eitt spennandi og avbjóðandi starv saman við royndum starvsfeløgum.
- møguleika fyri dagføring og eftirútbúgving.
- løn sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og FTL.

Tú:
- kanst venda tær til Sigurd Vatnhamar, leiðandi lærara, á timburdeildini tlf. 521106, um tú vilt vita meiri um starvið.
- skal senda okkum tína umsókn við upplýsingum um útbúgving og royndir **innan 25. jan. 2007** til Tekniska Skúlan í Tórshavn, Postboks 3239, 110 Tórshavn.

Størvini, sum umfata undirvísing av húsasmiðum og snikkarum, skulu setast skjótast til ber. Til fasta starvið eru fyrstu 2 árini royndartíð.

---

*Timburdeildin á Tekniska Skúlanun í Tórshavn tekur sær av undirvísing av húsasmiðju- og snikkaralærlingum og SIT-næmingum.*
*Eisini undirvísa lærararnir á eftirútbúgvingarskeiðum og teimum víðari útbúgvingum, sum skúlin hevur. Á deildini starvast 8 lærarar og ein verkvørður.*

---

# M/S »ARCTIC SWAN«
## Norge
søker
# Fabrikksjef
med relevant erfaring.
Skiftordning 1-1, dagdeling,
torsk/reke-trål (Reke øst-Grønland).

Søknad med referanser sendes til einar@remoyrederi.no
evt. fax. nr. 0047-70 13 34 01 / mob.nr. 0047-41 600 300

---

# Arbeiðsfólk til bingjuplássið Norði á Brúnum, í Kvívík

Søkt verður eftir røskum og álítandi arbeiðsfólki til móttøkupláss kommununar, sum letur upp leygardagin 3. februar 2007, kl. 14.

Móttøkuplássið verður opið mánadag og mikudag frá kl. 17 til 19, og leygardag frá kl. 14 til 17.

Arbeiðstíðin er 9 tímar um vikuna.

Umsóknir skulu vera kommununi í hendi seinast leygardagin 27. januar 2007

**Kvívíkar kommuna**
Víkarvegur 4 · 340 Kvívík · Tlf. 42 12 94 · Fax 42 14 98

---

**Vit átaka okkum alt mekaniskt arbeiði**

ØLL BILSLØG

**Søla av FULDA dekkum**




**BILVERKSTAÐIÐ · TLF. 50 79 77**
485 Skálafirði

---

# Lærlingur til frisørsalong í Suðurstreymoy

Søkt verður eftir fyrikomandi kreativum og ábyrgdarfullum lærlingi til frisørsalong.

Umsóknin kann sendast til **»Bill. mrk. 13007«**.

---

BÓKHALD | ROKNISKAP | MVG | DEBITOR/KREDITOR

# Bókhaldsstovan
HJÁ REGIN KLARGAARD

NIELS WINTHERSG. 7 | TÓRSHAVN | TEL 21 81 96 | BHRK@POST.OLIVANT.FO